## Brown fer ongan veg



Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, hevur verið fyri hvøssum atfinningum í seinastuni orsakað av gøluni um samsýningar hjá tingmonnum, men hann hevur kortini ongar ætlanir um at stinga í sekkin. Tað segði hann í samrøðu við kringvarpið BBC nú á hvítusunnu. Hetta er heldur ikki tann besta tíðin at tosa um eitt skifti í Labour-leiðsluni. Í dag skulu bretar velja umboð í ES-tingið, og meiningakanningar benda á, at stjórnarflokkurin fær ein frammaná og endar á triðja plássi aftan fyri tey konservativu og liberala flokkin.

## Kurdar útflyta egna olju

Kurdarnir har norðuri í Irak fóru í morgun undir at útflyta olju úr teimum stóru keldunum í tí kurdiska landspartinum. Kurdarnir hava gjørt avtalu við stjórnina í Bagdad, og sambært henni kunnu teir útflyta 90.000 tunnur um dagin í fyrsta umfari. Kurdiska oljan verður flutt ígjøgnum rørlieðingar í Turkalandi, og kurdarnir avgera sjálvir, hvussu og hvar teir selja oljuna á heimsmarknaðinum, skrivar Reuters. Ein talsmaður fyri kurdisku myndugleikarnar sigur við tíðindastovuna, at ætlanin er at tvífalda útflutningin tey bæði næstu árini.

# Ikki óhugsandi at Skálatrøð verður karmur um næstu Fish Expo Faroes



**Petur Mohr Reinert sigur, at talið av vitjandi á fiskivinnustevnuni Fish Expo Faroes 2009 helst var umleið helmingin minni, enn vanligt hevur verið til eina slíka stevnu í Føroyum. – Fyri framsýnararnar nýtist hetta ikki at merkja nakað, men fyri fíggjarliga partin ger hetta sjálvsagt mun, sigur hann**

FISH EXPO FAROES
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hóast talið av vitjandi var væl minni hesaferð enn til aðrar fiskivinnustevnur, sum hava verið í Føroyum, væntar Petur Mohr Reinert, fyriskipari, at tiltakið hongur saman fíggjarliga*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fiskivinnustevnan North Atlantic Fish Fair, sum í nøkur ár varð hildin á økinum hjá Runavíkar havn, endaði í stóru høllini hjá Poul Mohr á Sandvíkarhjalla. Tá teir, sum løgdu lunnar undir hesa stevnu, sleptu, tóku aðrir yvir, og stevnan broytti navn og skifti eigara.

Í síðstu viku varð so Fish Expo Faroes hildin í tveimum stórum tjøldum á niðara vølli í Gundadali. Tjøldini vórðu leigaði úr útlandinum, og tá eitt slíkt tiltak verður sett upp á einum fótbóltsvølli, skulu nógv fyrivarni takast, so vøllurin ikki tekur skaða.

Petur Mohr Reinert, sum er ein av fyriskiparunum aftanfyri Fish Expo Faroes, sigur, at bæði loysnin við tjøldunum og økið á fótbóltsvøllinum, har tjøldini vórðu sett upp, riggaði væl, men hann dylur ikki fyri, at tað hevur sínar vansar við at skipa eina slíka framsýning á einum fótbóltsvølli.

- Í fyrsta lagi gingu nógv á býráðið, tí tey høvdu brúk fyri fótbóltsvøllinum hesar dagarnar, tjøldini stóðu á vøllinum. Í øðrum lagi er neyðugt við stórum fyrivarni, tá tú arbeiðir á einum slíkum vølli. Hetta krevur nógv eykatilfar til at verja vøllin, bæði í finéri og koyriplátum, sum eru dýrar at leiga og frakta. Tú kanst ikki gera nakrar rørslur á økinum við vogni uttan so, at tú koyrir á koyriplátum, og tað kann gerast nokso trupult.

Petur Mohr Reinert sigur, at tá eftirmetingarfundur verður, verða eisini umboð fyri Tórshavnar býráð við, tí Tórshavnar kommuna er ein so stórur partur í hesum tiltaki.

Hann dylur ikki, at hóast Gundadalur er væl egnaður sum framsýningarstaður, tí økið liggur væl fyri í mun til eitt nú Sandvíkarhjalla, hevði eitt økið sum Skálatrøð verið tað heilt perfekta, sum hann tekur til.

- Vit fara tí at reisa málið á eftirmetingarfundinum um henda møguleika til næstu stevnu, sum longu er ásett at verða í døgunum, 25-27. mai í 2011, sigur Petur Mohr Reinert.

Fyrireikarin vísir á, at økið við Skálatrøð er nóg stórt, og her hevði tú rættiliga verið í hjartanum á høvuðsstaðnum.

- Nakað annað er so, um tað ber til at fáa hetta økið til endamálið, og so er spurningurin, hvussu parkeringsviðurskiftini kunnu loysast, meðan Skálatrøð verður brúkt til fiskivinnustevnu, um so verður.

Petur Mohr Reinert sigur, at um tiltakið lá á Skálatrøð við asfalti rundan um tjøldini, hevði tað bert tikið hálvan annan dag at sett tjøldini upp og ein hálvan dag at tikið tey niðuraftur.

- Nú tjøldini vórðu reist á niðara vølli í Gundadali, tók tað okkum hálvan fjórða dag at seta tey upp og hálvan triðja dag at taka tey



*- Tað hevur nakrar eykaútreiðslur við sær at hava eina slíka framsýning á einum fótbóltsvølli, sigur Petur Mohr Reinert, fyriskipari*
*Mynd: Jens Kristian Vang*